# Miðvágs Badmintonfelag 40 ár

**Tann 10. oktober fyllir Miðvágs Badmintonfelag 40 ár.**

Øll árini hevur felagið verið virkið. Á 40 ára degnum fær felagið nýtt búmerki sum ein av limunum Michael Gram hevur gjørt.

Búmerki ímyndar Vágoynna, ein ketchara og badmintonbólt, tað er einkult og sigandi, at júst Vágoyggin er á myndini sigur eisini, at hetta er eitt felag fyri alla oynna.

Tað koma eisini úr allara oynni at spæla badminton, heilt úr Bø.

Kappingarárið er júst byrja, fyrsta dagin teknaðu væl fleiri enn 100 børn og ung seg til venjing.

Felagið hevur venjara, indaran Aritra Nandy, tað er 3 árið at hann er venjari. Felagið hevur egna heimasíðu: www.MBF-online.subnet.dk

Felagið hevur havt nøkur heldur ótradsionel og gagnlig tiltøk fyri at fáa pening inn til rakstur av felagnum. Fyri nøkrum árum síðan gav felagið eitt Føroya Kort úr, sum bleiv borið í hvørt hús í Vágum, seinni gav felagið eitt stórt Europakort út, sum eisini bleiv borið ókeypis út í hvørt hús, hetta hevur verið til stóra gleði og gagn fyri øll.

Seinni í ár fer felagið at geva jólamerkir út, eins og ein borðkalendari við vøkrum myndum úr Vágum eisini kemur út.

### Søgan

Stovnanin av felagnum. Felagið bleiv stovnað 10. Oktober 1963. Stovnarnir vóru: Andrias Jørgensen, Miðvág, Rógvi Egilstoft, Miðvág (seinri Sandavág). Og teir ið spældu við frá byrjan vóru: Ian L. Joensen, Miðvág, Gudmund Niclasen, Miðvág.

Seinri komu hesir við: Hans M. Niclasen, Miðvág Eyðun S. Samuelsen, Miðvág, Ólavur Hansen, Miðvág, Jens Eli Ellefsen, Miðvág, Marius Pauli Thomassen, Sandavág, Svend Åge Ellefsen, Sandavág, Gutti Petersen, Sandavág

Nevnd: At byrja við tók Andrias sær av øllum fyri felagið og stílaði meistarliga fyri øllum.

### Eitt sindur um byrjanina:

Stovnanin: Sum sagt var Andrias Jørgensen ein av stovnarunum. Andrias hevði verið í Danmark eina tíð, og har hevði hann roynt at spælt badminton saman við einum svágri. Tá Andrias so kom aftur til Miðvágs, hevði hann, sum hann sjálvur sigur 'fingið blóð á tonnina' og hug at royna hetta nýggja spæl. Kontaktaði tí lærarin Rógva Egilstoft, tí einasti møguleiki at spæla badminton var í fimleikarhøllini á skúlanum á Giljanesi.

Andrias setti seg síðan í samband við Ian Joensen og Gudmund Niclasen, sum sjálvandi hvørgin visti hvat Badminton var, men Andrias greiddi frá, at tað var nakað líknandi tennis. Tennis kendu teir, tí teir pladu at spæla tennis á sandinum sum unglingar.

10. 10. 1963 møttust so hesir fýra í gamla skúla og avgjørdu, at farast skuldi í gongd. Men av tí eingin hevði nakað at spæla við, hevði Gudmund tikið eitt katalog yvir ketsjarar, net og bóltar við. Allir bestiltu sær so ketsjara og nakrar plastikbóltar. Eitt net bleiv bestilt í felag. Ketsjarnir (sum vit frá byrjan kallaðu spakar, og blivu við at kalla so, tí soleiðis kallaðust teir, tá vit spældu tennis) vóru sjálvandi ikki teir dýrastu og bóltarnir av plastik, tí hinir vóru so dýrir.

Andrias stílaði síðani fyri at fáa loyvi at mála gólvið í fimleikarahøllini. Andrias málaði síðan vøllin eftir málunum, sum vóru funnin í eini bók.

### Byrjanin

Tað hevði verið stuttligt í dag at sæð byrjanina. Fýra manns spæla badminton, har bert ein av teimum hevur eina hóming av hvussu skuldi spælast og hvørjar reglur vóru fyri spælinum. Tað bleiv tí í byrjanini oftani stórar og langar diskutiónir um, hvussu lógirnar skuldu skyljast. Andrias hevði ein faldara við lógunum, men seinri vóru funnar nýggjar lógir á skúlanum.

Hesar lógir vístu seg síðan at verða heilt nýggjar, hvar t.d. ikki var feilur at raka á 'træið', og tað var ein stórur lætti, tí træið bleiv sjálvandi nógv brúkt í fyrstanini.

Venjingardagarnir vóru fast Týsdag og Fríggjadag kl. 8 á kvøldið og tað bleiv møtt væl upp. Fyri tað mesta bleiv spælt 'double' , og komst tað av, at tað vóru so nógvir til ein bana. Fyri at allir skuldu fáa eitt sett, blivu 2 skiftir út hvønn dyst. Soleiðis gekk tað so uttan støðg í 2 tímar.

Tað mátti ikki spælast í vanligum skóm í 'gymnastiksalinum', sum hann bleiv kallaður. Eingin av øllum spælarunum hevði nakrar badmintonskógvar sjálvandi, tí var einki annað at gera, enn at spæla skóleysir, og tað bleiv so gjørt tey fyrstu árini, til onkur fann útav, at løriftsskógvar kundu nýtast.

### Kappingar, vinardystir

Tá vant var eina tíð, fingu spælarnir mót at bjóða øðrum av. Í Sørvági vóru teir eisini byrjaðir at spæla badminton, so har var farið fyri at ein kundi avprøva seg sjálvan. Sørvingarnir vóru eisini glaðir fyri hesar dystir, so báðir partar fingu nakað burturúr.

Seinri bleiv eisini farið til Havnar at royna seg. Sjónligt var altíð, at MBF hevði yvirlutan í double, men vóru tó ikki heilt sørir í single heldur. Tað blivu gjørdir fleiri túrar til Havnar, har teir onkuntíð avheintaðu okkum í bili í Vestmanna. Havnamenn komu eisini fleiri ferðir vestur.

### Ymiskt

Tað bleiv oftani flent eftir okkum frá MBF, tí vit kallaðu ketsjarnar fyri spakar, men tað sat so fast at brúka orið spaki, at tað var ógjørligt at lata verða. Onkur fyrislóð at felagið burdi veri kallað SPAKIN.

### Føroyameistara kapping

Fyrsta føroyameistarakappingin í badminton var í 1966. Ian og Gudmund møttu upp til føroyameistaraheiti í 25 ár uttan at leggja nakað ár ímillum.

Nevndin í felagnum í dag er: Uni S. Joensen, Miðvágur, Michael Gram, Sørvágur, Sjúrður Poulsen, Miðvágur, Hansina á Plógv, Sandavágur,Torkil Petersen Sandavágur.

Møguliga verður ein jubleumsveitsla seinni í ár.

2nd Klax KH International:

# Aftur gerandisdagur

**Úrslitini frá fjórða umfari í IM kappingini uppi í Skálanum í Klaksvík fløskaðu seg ikki av besta slag fyri føroysku luttakarnar**

TALV

*www.faroechess.fo*

Tað eydnaðist bert Hans Kristian Simonsen at vinna sítt talv móti Flóvin Tór Næs. Flóvin kom heldur illa frá byrjanini og Hans Kristian fekk við virknum spæli hildið fast um fyrimunin hjá sær. Í endatalvinum megnaði Hans Kristian við eini taktiskari vending at fáa fram vunna støðu, hóast Flóvin hevði frúgv móti róki og bispi. Eitt gott talv hjá Hans Kristiani, sum er komin uppá 50 % skoru.

Martin Poulsen tapti móti íslenska altjóða meistaranum Sævar Bjarnason, sum nú hevur vunnið trý talv á rað. Hann telvar sera væl í løtuni og verður ringur at taka sum er.

Heini Olsen, sum hevði bestu norm møguleikarnar undan talvinum í morgun, tapti fyri svenska IM' aranum Johan Eriksson. Heini stóð møguliga betur enn hann var greiður yvir, men treivst ikki væl í støðuni. Aftaná nakrar óneyvar leikir frá klaksvíkinginum, setti Eriksson trumf á og mátaði kongin hjá Heina. Nú er kravið til Heina, at hann fær 4 stig útav teimum síðstu 5 talvunum — ein sera torfør uppgáva í so sterkum selskapi.

Loksins tapti Ólavur eisini sítt talv móti dananum IM Klaus Berg, sum rættiliga hevur funnið stevið aftaná slaku byrjanina. Hetta var triðja tapið á rað hjá Ólavi, sum neyvan orkar at røkka teimum gyltu 6 stigunum á hesum sinni.

Á odda í bólkinum liggja nú IM Johan Eriksson og IM Sævar Bjarnason báðir við trimum stigum. Heini Olsen og Hans Kristian Simonsen liggja á fimta plássið við 2 stigum.

Í unglingabólkinum hevur Rani Baldursson skúgva alla mótstøðu til viks og hevur hann higartil bert latið eitt hálvt stig frá sær. Í toppuppgerðini í dag móti Sjúrða Thorsteinsson, fekk hann kortini nakað av hjálp frá talvgudinnuni Caissu, tá hann vann eitt endatalv við eini finnu minni. Nærmasti kappingarneytin hjá honum er nú Helgi Dam Ziska, sum hevur fingið 3,5 stig higartil. Í morgin klokkan 10:00 bresta teir báðir saman og kravið til Helga er ein sigur, um spenningur framvegis skal vera til staðar í unglingakappingini.



BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo





**Kunngerð**

**um uttangarðsútskiftingarfund við Gjógv**

Næsti útskiftingarfundur um býti av haganum, Dalur og Fløtur, matr. nr. 230, verður í samkomuhúsinum mikudagin 22. okt. 2003 kl. 10.00.

N. v.
Bjarni Hansen,
útsk. form.



**Havnar Telvingarfelag**

Barnatelving er hvønn mikudag í talvhúsinum.

Børn upp til 4. flokk frá kl. 16-18.
Børn í 5. flokki og upp til 10. flokk frá kl. 18-20.

**Havnar Telvingarfelag**



**Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur**

frá SAHAVA verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 11. og 12. november 2003 og á Landssjúkrahúsinum 13. november 2003.

Tíð fæst við at ringja á tlf. 455463 mánadag og týsdag kl. 10–12 í seinasta lagi 4. november 2003.



Rør & Blikk

**RØR- & BLIKKSMIÐIR**

Søkt verður eftir tveimum rørsmiðum ella fólki við royndum innan HVS arbeiði at byrja beinanvegin. Talan er um vanligt HVS arbeiði umframt arbeiði innan vatnviðgerð til svimjihylar.

Talan er um fast arbeiði við góðari løn.

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tlf. 322 999 far. 225 345

*Rør & Blikk fæst umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svimjihylar.*

Rør & Blikk, Undir Gráasteini 65, 100 Tórshavn,
tlf: 322 999 far 225 345
www.rorblikk.fo







**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3557, Sp/f Matr. Nr. 766D, 700 Klaksvík.
**Viðtøkur broyttar:** 02.10.2003.
**Nýtt navn:** Sp/f Klaksvíkar Autolakering
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Jan Joensen, Undir Brúnni 18, 700 Klaksvík.
**Innkomin sum stjóri:** Ólavur Sigfríðarson Hansen, Víkavegur 57, 700 Klaksvík.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka bilverkstað og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 9. oktober 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3665
**Navn:** Sp/f 1/9-2003
**Adressa:** J. Broncksgøta 48, 100 Tórshavn.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 01.09.2003
**Viðtøkudato:** 01.09.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Havgrímur Johannesen, J. Broncksgøta 48, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Havgrímur Johnnesen, J. Broncksgøta 48, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.09.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil.

*Skráseting Føroya tann 8. oktober 2003*

*Kristin Balle*







**Starvsfólk**

**til Bónus í Havn**

Søkt verður eftir einum starvsfólki til at sita við kassan.

Arbeiðstíðin er uml. 30 tímar um vikuna.

Løn smb. sáttmála við S&K.

Umsóknarfreistin er 17. oktober 2003.

Skrivlig umsókn skal sendast til:
Bónus, Óðinshædd, 100 Tórshavn,
att.: Janus S. Rasmussen.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Janus á telefon 31 52 63.

BÓNUS


















heystið - veitslur

Restorffs

Nú kemur **heystið**, ræst kjøt, nýggj eplir, røtur og so allar veitslurnar hjá ítróttarfeløgum, bindiklubbum, brúdleyp, rundir føðingardagar, veðraball, haruskjóting og so sjálvandi jólaborðhaldini.

Vit hjá **Restorffs** eru altíð tilreiðar við einum góðum tilboði. Vit koyra út, avheinta, lána gløs ókeypis og leggja lag á. Hjá okkum er ongin veitsla ov lítil og ongin ov stór og vit garantera 24 tímars tænastu og stand by.



tlf. 31 47 28
email : restorff@post.olivant.fo
***Tit ringja – vit bryggja***
Restorffs

HESTPRENT · TEL. 314 555